# Umboðsmaðurin gjørt enda á drúgvum máli

**Málið um lønina hjá seturskrivaranum á Fróðskaparsetrinum er nú liðugt viðgjørt av Løgtingsins umboðsmanni**

KÆRA
*Heri á Rógvi*



*Fíggjarmálaráðið sleppur rímiliga snikkaleyst í málinum um lønina hjá setursskrivaranum á Fróðskaparsetrinum*

Eitt mál um løn til seturskrivaran hjá Fróðskaparsetri Føroya er nú liðugt viðgjørt av Løgtingsins umboðsmanni. Málið byrjaði, sambært Fíggjarmálaráðnum, heilt afturi í 1997, og er ikki endaliga liðugt fyrr enn nú.

Umboðsmaðurin greiðir soleiðis frá málinum:

»Fróðskaparsetur Føroya hevur sent umboðsmanninum eina klagu um drúgvu viðgerðartíðina hjá Fíggjarmálaráðnum í málinum um ásetanina av lønini í seturskrivarastarvinum. Eftir, at málið varð avgreitt í Fíggjarmálaráðnum í 2000, vendi Fróðskaparsetrið sær aftur í jan. 2001 til Fíggjarmálaráðið og vísti á, at fortreytirnar fyri starvinum vóru broyttar. Hóast enn eina áheitan í des. 2001 og fleiri rykkjarar í 2002, hevði Fíggjarmálaráðið framvegis ikki svarað Fróðskaparsetrinum, tá klagan varð send umboðsmanninum í nov. 2002. Fíggjarmálaráðið avgreiddi málið við skrivi til Mentamálaráðið, dagfest 20. des. 2002.

Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at finnast at avgerðini hjá Fíggjarmálaráðnum, men gav ráðnum eina átalu fyri, at tað hevði tikið so drúgva tíð at viðgera hetta málið, eins og at Fíggjarmálaráðið ikki hevði svarað teimum mongu skrivunum frá Fróðskaparsetrinum.«

**Liðugt?**

Á Fíggjarmálaráðnum fegnast tey øgiligt um avgerðina hjá umboðsmanninum. Aðalstjórin, Petur Alberg Lamhauge, hevur sent eitt tíðindaskriv út, har hann sigur seg fegnast um, at avgerðin hjá umboðsmanninum veitir teirra avgerð stuðul.

Átaluna um ov drúgva málsviðgerð tekur Fíggjarmálaráðið til eftirtektar. Ráðið hevur longu broytt sínar mannagongdir, soleiðis at hetta ikki endurtekur seg, sigur Petur A. Lamhauge.

Løgtingsins umboðsmaður ger ikki meira við málið, og hetta er somuleiðis galdandi fyri Fíggjarmálaráðið.

Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetrinum, hevði mikumorgunin ikki lisið avgerðina hjá umboðsmanninum, og hon ynskti tí ikki at gera nakrar viðmerkingar til málið.

– Vit hava ikki tikið støðu til nakað enn, sigur Malan Marnersdóttir.

# Týskarar stjala vimplar

**Mikumorgunin vórðu fimm týskarar handtiknir fyri at stjala vimplar uttanfyri SMS**

LØGREGLA
*Heri á Rógvi*



*Fløgg og vimplar hoyra til ein fótbóltsdyst. Fløggini eru eisini loyvd inn á Tórsvøll. Men nakrir týskarar fóru yvirum markið, tá teir stjólju vimplar frá SMS.*
*Mynd: Jan Müller*

Væl mannaða løgreglueindin í Føroyum - minus fólk í feriu plus seksti danir - hevði ein friðarligan dag týsdagin og eina friðarliga nátt.

Hetta upplýsir Uni Vestureið, politiinspektørur, í tíðindaskrivi í týsmorgunin.

Einki uttan undantak. Náttina til mikudag vórður fimm týskarar tiknir í sambandi stuldur av níggju vimplum uttanfyri SMS. Tríggir vórðu tiknir á staðnum, og tveir vórðu tiknir seinni.

Upplýst verður, at teir handtiknu eru millum 19 og 28 ára gamlir. Teir eru til avhoyringar á politistøðini, og støða verður seinni tikin til, hvat hendur víðari í málinum.

Tá Norrøna legði at í Lerwick í nátt, gjørdi løgreglan eftirlit. 3 útlendingar vórðu frávístir, og sluppu teir tískil ikki við Norrønu til Føroya.

– Frávísingin er gjørd av trygdarorsøkum í sambandi við landsdystin og partvís av øðrum orsøkum, sum t.d. væntandi atgongumerki til dystin, skrivar løgreglan í tíðindaskrivi.

# Rokna við Týsklandi

**Dansk Tipstjeneste er sannførd um, at Týskland vinnur á Tórsvølli**

DYSTUR
*Heri á Rógvi*

Flest øll rokna við, at Týskland fer at vinna á Føroyum á Tórsvølli.

Og tað ger Dansk Tipstjeneste so sanniliga eisini

So sannførdir eru serfrøðingarnir hjá Dansk Tipstjeneste, at ein týskur sigur við tveimum málum bert gevur peningin 1,35 ferðir aftur.

Dysturin er bara settur á »Den lange« sum sokallaður handikap dystur, so sannførdir eru teir.

Ein javnleikur ella sigur til føroyingar gevur peningin 5,9 ferðir aftur.

Eisini ber til at vedda um, hvør er á odda í hálvleikinum.

Har gevur ein føroysk leiðsla peningin 9,5, javnleikur 2,5 og týsk leiðsla 1,55.

Dansk Tipstjeneste roknar eisini við nógvum málum.

Dysturin kann veddast upp á, hvussu nógv mál koma, og har geva fýra mál ella fleiri peningin 2,1 ferðir aftur, 2-3 mál kasta 2,4 ferðir peningin av sær og innskotni peningurin kann faldast við 3,9 kemur í mesta lagi eitt mál í dystinum.

Hendan greinin er skrivað níggju tímar áðrenn dystin.

# Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum

**Bileftirlitið hevur sent út hagtøl yvir skráseting av nýggjum akførum fyri januar-mai í 2003. Talvan vísir at sølan av nýggjum bilum er minkandi. Sølan av persónbilum er minkað við 20 prosentum**

TÍÐINDASKRIV
*Bileftirlit Føroya*

HAGTØL
*Magnus Gunnarsson*

Í 2002 vóru seldir 10 lastbilar frá januar til mai, men í ár er bert ein lastbilur seldur. Talið á persónbilum er 139 bilar færri, hetta er ein minking upp á 20%. Í mai mánað vórðu 121 persónbilar seldir, hetta talið var 194 í fjør. Samlaða minkingin í bilasøluni er uppá 18,5%. Orsøkirnar til minkandi bilasøluna eru ivaleyst fleiri. At færri lastbilar verða seldir, kundi verið eitt tekin um at ikki so nógv stór byggiarbeiðir eru í gongd í løtuni. Sølan av persónbilum er minkað við 20 prosentum. Orsaka av verkfallinum hava nógvir nýggir bilar staði í Danmark og bíða allan mai mánað. So um verkfallið ikki hevði verið, høvdu tølini sæð nakað annarleiðis út.

Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN-MAI í 2003 og 2002.

| Akfaraslag | Mai 2003 | Mai 2002 | Broyting Mai 03/02 | Jan-Mai 2003 | Jan-Mai 2002 | broyting 2003/2002 | %broyting 2003/2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | |
| Bussar | 1 | 0 | 1 | 3 | 4 | -1 | -25,00% |
| Hýrubilar | 1 | 0 | 1 | 8 | 10 | -2 | -20,00% |
| Lastbilar | 0 | 5 | -5 | 1 | 10 | -9 | -90,00% |
| Leguvognar | 0 | 0 | 0 | 4 | 3 | 1 | 33,33% |
| Motorsúkkla | 1 | 2 | -1 | 5 | 4 | 1 | 25,00% |
| Neyðsendakfar | 0 | 0 | 0 | 1 | 2 | -1 | -50,00% |
| Persónbilar | 121 | 194 | -73 | 543 | 682 | -139 | -20,38% |
| Smábussar | 0 | 0 | 0 | 3 | 1 | 2 | 200,00% |
| Tangabilar | 0 | 0 | 0 | 3 | 0 | 3 | |
| Viðfestivognar | 11 | 17 | -6 | 35 | 45 | -10 | -22,22% |
| Vøruvognar | 28 | 32 | -4 | 119 | 130 | 11 | -8,46% |
| Samlað | 163 | 250 | -87 | 726 | 891 | -165 | -18,52% |

Í mai 2003 eru skrásett 29 nýggj prutl og higartil í ár eru skrásett 75 nýggj prutl.



# Gamla heilsølan verður kanska skúli

**Nú er líkt til almanna- og heilsuskúlin í Suðuroy fær gamla heilsølubygningin hjá Poul Hansen at húsast í**

SKÚLI
*Áki Bertholdsen*



*Í hesum húsinum, heilt niðri við sjóvarmálan á Tvøroyri, helt heilsølan hjá Poul Hansen til í nógv ár. Nú verður húsið kanska almanna- og heilsuskúli*

Nú verður arbeitt við at finna almanna- og heilsuskúlanum á Tvøroyri eina varandi loysn.

Og tað er nógv sum bendir á, at tað verður í gomlu heilsøluni hjá Poul Hansen á Tvøroyri, at skúlin fær eina varandi loysn.

Annars hevur verið frammi, at arbeitt varð við at flyta skúlan til Vágs, men tað avsannaði Høgni Hoydal, landsstýrismaður í mentamálum staðiliga í Sosialinum herfyri.

Hann segði, at tvørturímóti verður arbeitt við at finna skúlanum varandi høli á Tvøroyri. Hann segði eisini, at onkur høli vóru í kikaranum.

Og nú er greitt, at tey hølini, sum eru í kikaranum, er gamli heilsølubygningurin hjá Poul Hansen, sum standa í natúruvøkrum og friðaligum umhvørvi heilt niðri við sjóvarmálan á Hvítanesi á Tvøroyri.

Í Býarætlanini hjá Tvøroyrar Kommunu er økið lagt av til havnir og ídnað.

Men á býráðsfundi herfyri, samtykti býráðið at broyta byggiætlanina so at økið hereftir verður sett av til almenn endamál.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at tað er alneyðugt hjá skúlanum at fáa nýggj høli.

Skúlin hevur so lítil høli, at hann hevur ikki kunnað hvat tað virksemi, sum ætlanin var. Higartil hevur hann bara uppskúla heimahjálpir, men næsta summar skal hann eisini taka næmingar inn til tað fullu almanna- og heilsuútbúgvingina.

– Tá verða einir 80 næmingar í skúlanum ávísar tíðir og ongantíð minni enn 40 næmingar, sigur borgarstjórin.

Hann sigur, at tað verður ongin møguleiki at húsa so nógvum næmingum í teimum lítlu húsunum, sum skúlin nú hevur.

Skúlin heldur nú til í gomlu lærarahúsunum á Tvøroyri, men hevur eisini verið noyddur at fáa høli frá kommunuskúlanum fyri at nøkta tørvin, men tað er ólagaligt at arbeiða í fleiri húsum.

Samstundis er greitt, at mentamálaráðið hevur ongar ætlanir um at byggja nýggjan skúla, tí hann er ikki á nakrari langttíðar byggiætlan hjá landinum.

Sostatt er einasti útvegur at finna okkurt egnað hús, sum kann byggjast um til at verða almanna- og heilsuskúli.

Kristin Michelsen sigur, at umboð fyri mentamálaráðið og skúlan hava hugt eftir heilsølubygninginum saman við Landsarkitektinum og tey halda, at húsið nøktar allan tørvin hjá skúlanum, men tað skal nakað væl av umbygging til.

Nú verður so bíðað eftir eini endaligari avgerð frá mentamálaráðnum.

**Øki til næmingaíbúðir**

Umframt at broyta byggisamstyktina fyri økið, har gamla heilsølan stendur, hevur býráðið eisini broytt byggisamtyktina fyri Tangatrøðina, tey nevna, sum er heilt tætt við.

Trøðin hevur verið sett av til sethús, men nú verður hon eisini sett av til almenn endamál.

– Tað er við tí í hyggju, at tað skal bera til at byggja bústaðir til næmingar, sum ganga á almanna- og heilsuskúlanum.

– Býráðið hevur hevur boðað almennu myndugleikunum frá, at staðfesta teir skúlan á Tvøroyri, er kommunan sinnað at lata grundstykki til ein sjálvsognarstovn at húsa næmingum í.

# Missurin er ikki álvarsligur

**Delta samtakið hevur eisini mist pening av verkfallinum, men støðan er ikki so álvarslig sum hjá øðrum virkjum**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Verkfallið hevur kostað okkum pening hvønn dag. Men støðan er ikki so álvarslig sum hjá øðrum virkjum.

Magnus Jespersen á Delta samtakinum tekur ikki so harðliga til orðanna eftir verkfallið, sum aðrir virkisleiðarar gera.

Herfyri boðaði Johan Páll Joensen frá, at í ringasta føri kann verkfallið fáa ta avleiðing, at virkið í Hvalba og á Eiði stongdu, tí tey gingu við hallið frammandundan.

Og í Sosialinum í dag, boðar Havsbrún frá rationaliseringum og tillagingum, tí verkfallið hevur verið so dýrt.

Men á Delta Seafood, sum hevur virkið á Tvøroyri og í Sandoynni, lata tey ikki so illa at.

Magnus Jespersen sigur, at tað kostar at hava virkini opin hvønn dag í rentum og avdráttum og øðrum føstum útreiðslum, samstundis sum onki kemur inn.

Men hann heldur ikki, at tey hava mist nakað serligt av sølusáttmálum.

–Vit hava mist ein sáttmála, sigur hann.

Hann sigur, at verður gongdin sum í fjør, fer lønarhækkingin at kosta flakavirkinum á Tvøroyri einar 450.000 krónur eyka um árið í lønarútreiðslum og teimum báðum virkjunum í Sandoynni fer lønarhækkingin tilsamans at kosta eina góða millión krónur eyka um árið.

Men hann hevur ikki somu støðu til avleiðingarnar, sum stjórin á virkjunum í Hvalba og virkinum á Eiði hevur, tí so álvarsliga sær hann ikki støðuna.



*Magnus Jespersen, stóri á Delta Seafood, sigur, at sjálvsagt hevur verkfalið kosta, men hann sær ikki so svart uppá tað av teirri orsøk, sum onnur gera*

## Upplýsandi fundur í Suðuroy um barnaheimið

KUNNING
*Áki Bertholdsen*

Í kvøld verður kunnandi fundur í Suðuroy um virksemið hjá Føroya Barnaheimið.

Fundurin verður í aulini í Vágs Skúla í kvøld klokkan 19.

Á fundinum fara umboð fyri Barnaheimið at greiða frá um barnaheimið og um virksemið, sum har er.

Fundurin er almennur, men hann er serliga ætlaður fólki, sum hava við børn og ung at gera, eitt nú lærarum, pedagogum, limum í barnaverndum, heilsusysystrum, skúlasjúkrasystrum o.s.fr.